Djóni Nolsøe Joensen
løgtingsmaður

Nr. 50/2019

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um sorgarfarloyvi til foreldur, sum missa barn, settur landsstýrismanninum í arbeiðsmarknaðarmálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at seta í verk sorgarfarloyvi til foreldur, sum missa barn?

Viðmerkingar:
Í Føroyum hava vit eina góða barsilsskipan, sum ger tað møguligt at vera burturi frá arbeiðsmarknaðinum, tá vit fáa eitt barn. Doyr barn í móðurlívi ella er deyðføtt, hevur tú somu rættindi, sum var tað livandi. Men doyr barnið seinni, hava foreldur eingi lógartryggjað rættindi til farloyvi.
Foreldur, sum eru í tí vanlukkuligu støðu, at barn teirra doyr, handfara støðuna ymiskt. Summi hava tørv á at sleppa skjótt aftur til arbeiðis, meðan onnur ikki hava orkuna til tess og hava tørv á at syrgja heima í eina tíð. Foreldur, sum hava tørv á hesum seinna, hava møguleika til at søkja um at verða sjúkrameldað, men mugu í støðuni sjálv syrgja fyri at søkja og endurnýggja fleiri ferðir, um tørvur er á tí. Í hesum sambandi er vælvild frá arbeiðsgevara avgerandi.

Tí er spurningurin, um tíðin ikki er komin til, at foreldur, ið missa børn, fáa lógartryggjaðan rætt til at syrgja í eitt ávíst tíðarskeið. Soleiðis vildi tað blivið eins natúrligt at fara í sorgarfarloyvi, tá vit missa eitt barn, sum at fara í barnsburðarfarloyvi, tá vit fáa eitt barn.

Á Løgtingi, 4. februar 2020

Djóni Nolsøe Joensen